sernám
NÁMSFRØÐILIG OG SÁLARFRØÐILIG RÁÐGEVING

Dagfesting: 31. januar 2024
Journal nr.: 21/23465-8
Viðgjørt: HH

BUMR - Hoyringar - Uppskot til broytingar løgtingslóg um barnaverndarlógina - freist 31.januar 2024

§ 15, stk. 1 verður aftan á nr. 11 sum nýtt nr. 12 sett: ''12) veita aðra hjálp til barnið og/ella familjuna so sum ráðgeving, viðgerð, praktiskan og námsfrøðiligan stuðul ella líknandi.''

Viðmerking:
Eitt av broytingaruppskotunum leggur upp til, at tað skal vera lættari hjá BVT kring landið at bjóða familjuráðgeving, har hetta verður mett eitt viðkomandi stig. Eitt broytingaruppskot, vit á Sernámi annars taka fult undir við.
Í hesum sambandi vilja vit tó vísa á týdningin av, at markamót millum geirarnar verða gjørd meira týðilig.Í dag verða líkar og líknandi tænastur veittar av bæði BVT og AV. Familjurnar vita ikki altíð, nær og hvar tær kunnu fáa hvørja tænastu. Tí er neyðugt, at tað verður nágreinað, hvør uppgáva liggur hjá hvørjum geira. Familjunum og tænastunum at frama.

Hetta er tó ikki tað tilboðið, sum er eitt tilboð til familjur, sum ikki longu eru mál hjá barnaverndartænasuni. Harumframt meta vit á Sernámi, at tørvur er á at revidera, um BVT hava grundarlag fyri at loysa tær mongu uppgávur, teimum verða áløgd. Sernám merkir í dag tørvin á familjuráðgeving, sum ikki er fevnd av kjarnuuppgávunum hjá stovninum, og sum í dag ikki liggja undir kjarnuuppgávuni hjá BVT. Lættari familjuráðgeving til tær í aðrar mátar ressursusterku familjurnar, sum vegna líkt og ólíkt hava børn í mistrivnaði og kreppu. Hetta er ein uppgáva, ið eigur at verða nærri definerað og forankrað í onkrum av landsstovnunum – evt. BVT. Tað er tí kanska eisini tørvur á at eftirmeta tænasturnar breitt sæð og nærri nágreina, hvørjar uppgávur hvør landsstovnur skal vara av.

Í § 19 verður sum stk. 5 sett: ''Stk. 5. Barnaverndarnevndin kann, við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir sambært § 15 í verk fyri foreldramyndugleikan, ímeðan barnið er sett heiman. Fyriskipanirnar skula viðvirka til at loysa teir trupulleikar, sum hava verið orsøk til at barnið varð sett heiman, og hjálpa foreldrunum í at hava umsorgan fyri barninum í sambandi við eina møguliga heimsetan ella í sambandi við samveru við barnið, ímeðan tað er sett heiman.''

Á Sernámi uppliva vit javnan, at átøk frá BVT verða endað, tí foreldrini antin takka nei, ikki merkja mun beinanvegin ella heilt einfalt ikki hava 'hug' at halda á við innsatsinum. Í summum førum, tá ið vit síggja eitt barn í stórum mistrivnaði, kann hetta vera eitt sera ógagnligt stig at taka fyri trivnaðin hjá barninum. Av og til eru avbjóðingarnar so samansettar, at tørvur er á at sampakka innsatsirnar millum ymisku geirarnar. Tá gerst ógvuliga óheppið og avmarkandi fyri samlaða innsatsin, at annars viðkomandi átøk verða endað. Onkuntíð er tørvur á, at man nettupp verður noyddur at halda á við einum innsatsi, eisini hóast man sum foreldur ikki beinleiðis sær endamálið við hesum. Hetta skal til fyri at betra um trivnaðargongdina hjá barninum. Vit á Sernámi síggja tí ikki tað gagnliga í, at foreldur uttan víðari bara kunnu takka nei, og at øll ætlað átøk so verða slept í úrtíð. Uttan eftirmeting av nøkrum slag.

Merkir henda broytingin, at hetta samtykki eisini skal til frá foreldramyndugleikanaum, tá barni er sett heiman, so kann støðan gerast tung fyri barni.

Tó hava vit viðmerkingar til lógina annars, men sum ikki er fevnt av broytingum í løutni. Um ynski er um hesar viðmerkingar, eru vit tilreiðar at koma við fleiri.

Vinarliga

Sernám

Harriet Hansen
Varastjóri

SERNÁM
Á FRÆLSINUM 32 . POSTRÚM 2036 . FO-110 TÓRSHAVN . TLF 360200 . FAX 310196 . SERNAM@SERNAM.FO . WWW.SERNAM.FO